# FCK skal koma fyri seg í Køge



*Todi Jónsson javnaði til 2-2 móti Viborg og tryggjaði harvið FCK eitt stig*

**Avrikið hjá føroyska liðnum í superliguni í fyrsta umfarinum var einki at reypa hurrá fyri**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Fótbólturin fór av álvara aftur á rull í Danmark í vikuskiftinum. Í dýrdarveðrinum og nógva hitanum í Parkini sóu 14.536 áskoðarar ikki serliga sannførandi FCK fáa eitt stig burturúr. Tað var eitt vónbrot.

Viborg var komið eftir javnleikinum. Teir vóru tvær ferðir á odda, og sjálvt um FCK javnaði til 2–2, tá tað restaði eitt korter, so vóru gestirnir væl nøgdir.

Tað var leingi ivasamt, um Todi Jónsson fór at vera førur fyri at spæla. Hann hevði verið skaðaplágaður og harvið hevði ikki borið honum til at venja saman við liðfeløgunum. Todi var á beinkinum frá fyrsta bríksli, meðan Peter Møller var í álopinum undir liðini á Zuma.

Todi varð skiftur inn fyri Peter Møller, tá seinna umfarið var átjan minuttir gamalt, og í 76. minutti javnaði hann til 2–2. Carsten Fredgaard, sum eisini var innskiftur, legði innfyri úr vinstru, og Todi stútaði í málið.

Í morgin fer FCK at spæla á útivølli ímóti Køge, sum roynir seg í bestu deildini fyri fyrstu ferð í seytjan ár. Todi Jónsson verður í FCK hópinum. Aftur í hesi vikuni hevur ein lítil skaði gjørt um seg. Undir venjing ólavsøkudag fekk hann eftir luftdyst ein snudd í økslina, men hetta hevur kortini ikki hildið honum burtur frá venjingini.

Dysturin í morgin verður sendur á TV3+ rásini klokkan 26.35. Køge stóð seg væl í fyrsta umfarinum. Teir vóru í Gladsaxe, har teir megnaðu 2–2 ímóti AB.

Brøndby legði leygardagin fyri sum eitt ódnarveður. Teir vunnu 3–0 í Silkeborg. Tá Brøndby fyri knøppum tjúgu árum síðani kom í bestu deildina, vístu teir leingi fínt og undirhaldandi fótbóltsspæl. Tað hava teir ikki gjørt síðstu árini. Nú er Michael Laudrup venjari, og tað sást aftur í spælinum, sum var hugflogsríkt og málsøkjandi og harvið eisini sera undirhaldandi.

Longu í dag klokkan 16 verður heimadysturin hjá Brøndby ímóti AB at síggja á TV3+ rásini. Dysturin er framskundaður, tí Brøndby mikudagin skal spæla seinna Europa Cup dystin ímóti albanska meistaraliðnum Dinamo Tirana. Mikudagin vann Brøndby 1–0 á heimavølli. Talan var ikki um serliga sannførandi sigur.

Samantaldi vinnarin av hesi uppgerðini skal spæla ímóti norska Rosenborg um eitt pláss í bólkaspælinum í europeisku meistarakappingini. Síðani lutur varð kastaður, hevur verið gjørt nógv burturúr uppgerðini millum norska og danska meistaraliðið. Mikudagurin fer at vísa, um tað verður Brøndby ella Dinamo Tirana, sum skal spæla ímóti Rosenborg.

AGF tykist hava fingið nýtt mót, síðani Poul Hansen gjørdist venjari. Fyrsta uppgávan hjá fyrrverandi Lyngby venjaranum og Farum ítróttarstjóranum var á heimavølli ímóti júst Farum, sum royndi seg í bestu deildini fyri fyrstu ferð. 8.882 áskoðarar møttu upp. Tað eru nógv fleiri, enn tað hava verið hesi seinastu soltnu árini í Århus. Teir sóu AGF vinna 2–0. Farum spældi ikki illa, men tað kom sjálvandi illa við, at teir longu á hálva tímanum mistu ein mann.

AGF fer í morgin aftur at spæla á heimavølli. Hesa ferð verður tað ímóti Esbjerg, sum tapti fyrsta heimadystin 2–1 ímóti AaB. Aalborg verður aftur í morgin á útivølli. Mótstøðuliðið verður FCM, sum á útivølli í fyrsta umfarinum tapti 2–0 ímóti OB.

Fyrsti heimadysturin hjá Farum verður í morgin ímóti Viborg.

Pakkaferðir summarið 2002
*2 vaksin & 2 børn í bili
Ferðist bíliga ...
Danmark
Danland* íbúðir
1 vika í frítíðaríbúð 09.08.
úr 10.431,-
Dan Center* summarhús
1 vika í summarhúsi 09.08.
úr 9.435,-
Noreg
Pers Hotel* í Gol
1 vika í summarhúsi 05.08.
úr 6.840,-
Hetland
Easterhoull* Chalets
1 vika í summarhúsi 05.08.
úr 6.394,-
Pakkaferð - Ísland
Key Hotellini
við 7 daga innivist á hotelli í dupultkamari
úr 5.814,-
fyri hvønn
Sigl & Flúgv
Siglt verður annan vegin og flogið hinvegin
Tórshavn - Hanstholm
og Keypmannahavn - Vágar ella hinvegin
úr 2.550,-
fyri hvønn
SMYRIL LINE
www.smyril-line.fo
Tel 34 59 00
e-mail: booking@smyril-line.fo
team85



# Molde er steðgað fullkomuliga upp

**Nú hava teir ikki vunnið í fýra dystum á rað, og mikukvøldið taptu teir ímóti botnliðnum Sogndal, sum í ein tíma var undirmannað**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Tað gongst ikki væl hjá Molde í løtuni. Meðan føroyingar hava hildið ólavsøku og eru komnir fyri seg eftir ólavsøkuna, hava teir í Noregi avgreitt tvey umfør í tippuliguni. Eitt umfar var í vikuskiftinum, og mikukvøldið og hóskvøldið vórðu dystirnir spældir, sum vórðu útsettir, tá spælararnir vóru í verkfalli fyrr í summar.

Molde er nú á fimta plássi. Tað eru sjey stig upp til Lyn, sum er á odda við 35 stigum. Men úrtøkan hjá Molde hevur tær seinastu ferðirnar verið so vánalig, at tað er lítið, sum bendir á, at teir fara at vera við í stríðnum um gullkrónurnar. Mikukvøldið spældi Molde í Sogndal, sum inntil í fjør var føroyska felagið í norskum fótbólti, og sum stríðist fyri at sleppa undan niðurflyting. Teir hava fingið hjálparvenjaran hjá norska landsliðnum, Harald Aabrekk, at vera stuðul á beinkinum, og tað tóktist hjálpa mikukvøldið. Sogndal spældi fyri lívinum, og teir vunnu 2–1.

Úrslitið verður mett at vera framúr, tí síðsta tíman spældi Sogndal við tíggju monnum. 32 minuttir vóru farnir, tá ein varð rikin av vøllinum fyri sum aftasti maður at taka bóltin við hondini. Tá var støðan longu 2–1. Håvard Flo stútaði Sogndal framum 1–0, og teir skoraðu til 2–1 beinleiðis uppá fríspark hjá Molde málverjanum, Eddie Gustafsson. Síðsta tíman vardi Sogndal, og Molde royndi at leggja trýst á, men teir megnaðu ikki at spæla seg til stórar møguleikar.

Eftir dystin ásannaðu Molde spælarar, at teir ivaleyst hava hugsað ov nógv um at vinna gull. Nú mugu teir bara savna seg um ta uppgávuna, sum stendur fyri framman. Og tað er væl skiljandi, at teir siga soleiðis, tí síðani summarsteðgin hevur gingið av skriðuni. Umframt 2–1 tapið í Sogndal, hava teir spælt tvær ferðir 0–0. Seinna ferðin var sunnudagin, tá teir vitjaðu Viking í Stavanger. Molde hevði fleiri møguleikar enn heimaliðið, men tað endaði málleyst.



*Tað gongur í løtuni illa hjá Jákup Mikkelsen og Molde í bestu norsku deildini*

### Oddastríðið

Lyn er framvegis á odda við 35 stigum. Hóskvøldið spældu teir málleysan javnleik á útivølli í Stavanger ímóti Viking. Teir á heimaliðnum hildu seg vera óhepnar ikki at fáa mál.

Stabæk vann mikukvøldið 3–2 á Moss og er næstfremst við 31 stigum. Heimaliðið spældi illa, og teir vóru sperdir mesta partin av tíðini, men tveir minuttir fyri leiklok fingu teir sigursmálið. Sunnudagin høvdu teir vitjan av Bodø/Glimt. Tá stóð heldur einki til, men Stabæk vann kortini 2–1.

Rosenborg er rættuliga farið at gera um seg. Hóskvøldið vóru teir í Bergen og spældu ímóti Brann. Tá tríggir minuttir vóru eftir av vanligu leiktíðini, var heimaliðið á odda 2–1, men Rosenborg vann 3–2. Teir eru nú komnir upp á triðja plássið við 30 stigum. Tað verður avgjørt mettur at vera møguleiki fyri, at teir kunnu vinna NM fyri 11. ferð á rað.

Sunnudagin vann Rosenborg eisini 3–2 á útivølli. Tað var ikki eiti á sigur, tí hann var ímóti oddaliðnum Lyn, og gestirnir vórðu sagdir at vera sera hepnir.

Í Lyn vóru teir misnøgdir við, at dómarin ikki bríkslaði fyri brotssparki til teir. Myndirnar vísa, at talan var um støðu av sama slagi, sum tá Todi Jónsson fyrr í summar varð snýttur av Kim Milton Nielsen í avgerandi dystinum um DM ímóti Brøndby. Og har afturat skoraði Rosenborg sigursmálið til 3–2, tá bara ein minuttir var eftir.

Odd Greenland er á fjórða plássi við 29 stigum. Teir sendu sunnudagin Moss, sum er næstniðast, heim úr Skien við 2–0 tapi. Niðast við bara sjey stigum er Start úr Kristiansand. Mikukvøldið spældu teir á útivølli ímóti Bodø/Glimt, sum vann 2–0. Start hevur givið skarvin yvir. Teir høvdu fimm spælarar á liðnum, sum vóru 20 ár og yngri, og avrikið varð mett at vera mest átókt tí hjá einum unglingaliði.

Eftir sigurin á Molde mikukvøldið er Sogndal komið upp á triði aftasta plássið, og nú hava teir vunnið tvær ferðir upp í slag. Í vikuskiftinum vunnu teir 2–0 á Vålerenga, men spurningurin er, um teir sleppa at varðveita tey stigini. Tað verður tosað um, at Sogndal hevði ov nógvar spælarar á vøllinum, sum ikki eru úr EBS økinum. Nú verður hetta kannað.

Lillestrøm liggur framvegis tungt í sjónum. Teir eru framvegis í niðurflytingarvanda, men sunnudagin eydnaðist tað endiliga at vinna 2–1. Á heimavøllinum høvdu teir vitjan av Bryne.

### Størri kapping

Jákup Mikkelsen er framvegis eykamálverji hjá Molde. Mánakvøldið vardi hann málið á næstbesta liðnum, sum vann 3–0 í Larvik.

Knud Lillebakk, sum er triði málverjin í Molde, hevur síðani í apríl verið útleigaður til Bryne. Nú flytir hann aftur til Molde, har hann frá 3. august skal kappast við Eddie Gustafsson og Jákup Mikkelsen um málverjuplássið.

Hesar seinastu dagarnar hevur verið nógv tosað og skrivað um, at Molde skal skriva sáttmála við Ronny Johnsson. Sáttmálaskeiðið hjá verjuspælaranum í Manchester United er liðugt, og Alex Ferguson ætlar ikki at skriva nýggjan sáttmála við norðmannin, sum nú leitar eftir nýggjum arbeiðsgevara.

Dánjal Andreasen, FSF formaður:

# Landsliðsvenjarin fekk nógv burturúr ferðini

**Nýggi føroyski landsliðsvenjarin, danin Henrik Larsen, hevur júst verið sín fyrsta arbeiðstúr í Føroyum sum føroyskur landsliðsvenjari. Formaðurin í FSF, Dánjal Andreasen, sigur, at Henrik Larsen fekk nógv burturúr ferðini, og at teir í FSF eru væl nøgdir við vitjanina**

LANDSLIÐSVENJARIN
*Heini í Skorini*

Fyrsti føroyatúrurin hjá Henrik Larsen sum føroyskur landsliðsvenjari er júst farin aftur um bak, og hevur hann sostatt fingið sínar fyrstu myndir av føroyskum fótbólti. Dánjal Andreasen, formaður í FSF, sigur, at landsliðsvenjarin fekk nógv burturúr, og at eftirmetingar FSF´s eru góðar.

– Henrik Larsen sá bæði venjingar, venjingardystir, Europa Cup dyst og steypafinaluna, og prátaði hann eisini við fleiri leikarar og venjarar umframt onnur fólk, ið eru tengd at landsliðnum. Dánjal Andreasen sigur, at landsliðsvenjarin sostatt fekk nógv burturúr, og at eftirmetingar FSF´s av fyrsta túrurin hjá Henrik Larsen eru góðar.

FSF formaðurin vísir eisini á, at teir hava fingið eina góða mynd av Henrik Larsen, og at hann tykist taka uppgávuna í álvara.

### – Hildið allar avtalur

Nógvar atfinningar hava verið mótvegis Henrik Larsen, ikki minst í fjølmiðlunum, men Dánjal sigur, at hesar atfinningar als ikki hava verið rættar.

– Landsliðsvenjarin hevur hildið allar avtalur, og hann hevur gingið øllum okkara krøvum á møti. Viðvíkjandi ferðini til Føroya, so kom hann hendavegin, so skjótt sáttmálaskeið hansara byrjaði, og tískil er ikki beint at finnast at honum. Dánjal sigur víðari, at um funnist skal vera at nøkrum, so er tað Fótbóltssambandinum, sum hevur sett krøvini til Henrik Larsen.

Eftirmetingarnar hjá Fótbóltssambandinum av fyrsta túrinum hjá landsliðsvenjararnum eru sostatt góðar, og sambært Dánjal Andreasen hava teir álit á Henrik Larsen og stuðla honum 100%.

Næsta uppgávan hjá landsliðsvenjaranum er at savna landsliðshópin í fyrireikingunum til EM undankappingina, og hevur hann uttan iva fingið nakað at hugsa um eftir ferðini í Føroyum.



*Henrik Larsen hevur júst verið sín fyrsta túr í Føroyum sum føroyskur landsliðsvenjari, og fekk hann sambært FSF nógv burturúr túrinum*